# Føroyingarnir fylgja væl við

**Mánadagin blandaði Hans Kristian Simonsen seg av álvara upp í toppstríðið, tá ið hann vann á norðmanninum Eiriki Gullaksen**

TALV
*Jóannes Hansen*

Tað var rættuligur spenningur í luftini, tá ið tað klokkan tvey seinnapartin í gjár varð farið undir sætta umfarið í fjórðu Klaksvík International í talvi, sum í hesum døgum er í Leikalund í Klaksvík.

Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði syrgdi mánadagin fyri, at vónirnar fyri føroyskum sigri eru góðar. Við svarta fólkinum vann hann við góðum spæli á norska IM Eirik Gullaksen og legði seg harvið undir liðina á svenska IM Johan Eriksson, sum mánadagin við svarta fólkinum telvaði remis móti Heina Olsen.

Mánadagin gekk tað eisini væl hjá Helga Dam Ziska, sum verður sagdur at hava telvað væl alla tíðina, men sum ikki fekk nakað burturúr teimum fyrstu trimum umførunum. Sunnudagin og mánadagin hilnaðist betri. Tá fekk ungi havnarmaðurin tvær ferðir remis, og tað tað varð í gjár avgjørt ikki mett óhugsandi, at hann skal fara at vinna okkurt talvið.

Teir seks telvararnir telva allir tvær ferðir móti hvørjum øðrum. Mánadagin vóru teir komnir runt soleiðis at skilja, at allir høvdu sitið yvir av hvørjum øðrum. Síðsta umfarið verður leygardagin.

Tað ber til at fylgja gongdini á heimasíðuni hjá Talvsambandi Føroya. Hon er at finna á www.farochess.com.

**5. umfar mánadagin**
Helgi Dam Ziska-IM Jens Ove Fries-Nielsen 0,5-0,5
FM Heini Olsen-IM Johan Eriksson 0,5-0,5
IM Eirik Gullaksen-Hans Kristian Simonsen 0-1

**6. umfar týsdagin**
IM Johan Eriksson-Helgi Dam Ziska
FM Heini Olsen-IM Eirik Gullaksen
IM Jens Ove Fries-Nielsen-Hans Kristian Simonsen

**7. umfar mikudagin**
Hans Kristian Simonsen-IM Johan Eriksson
Helgi Dam Ziska-FM Heini Olsen
Eirik Gullaksen-IM Jens Ove Fries-Nielsen

**Støðan eftir fimm tey fyrstu umførini**
Hans Kristian Simonsen og IM Johan Eriksson 3,5 stig
Heini Olsen 3,0 stig
IM Eirik Gullaksen og IM Jens Ove Fries-Nielsen 2,5 stig
Helgi Dam Ziska 1,0 stig

# Unglingarnir spæla í næstu viku

**NSÍ og HB unglingarnir skulu spæla finalu á Skála, og finalan í 4. deild verður leygardagin í Sandavági**

ENDADYSTIR
*Jóannes Hansen*

Nú er tað greitt, at finalan í unglingadeildini verður á Skála mikudagin í næstu viku klokkan 17.00. Finaluliðini eru HB, sum vann sína hálvfinalu móti B36, og NSÍ, sum eftir brotssparkskapping vann sína hálvfinalu móti KÍ.

Finalan skal sambært ásetingunum spælast á uttanveltaðum vølli, og FSF hevur gjørt av, at hon skal spælast á Skála. Petur Reinert verður dómari. NSÍ liðið verður sammett við liðið, sum hevur spælt seg í finaluna, ikki so lítið skert, tí tveir lyklaspælarar ikki vera við.

Einar Hansen var leikbannaður í hálvfinaluni, og hann verður eisini leikbannaður í finaluni. Páll M. Joensen, sum NSÍ hevur leigað úr HB, fer ikki at spæla við móti barndómsfelagnum.

Dysturin um triðja plássið verður mikudagin klokkan 17 í Leirvík. Hann verður millum KÍ og B36, og tað verður Rúni Gaardbo, sum fer at døma.

Í 4. deild verður finalan nú leygardagin. Hon verður millum MB og HB, hon verður spæld í Sandavági klokkan 15, og tað verður Suni Johansen, sum fer at døma.

Dysturin um triðja plássið verður í Gundadali leygardagin klokkan 11.00. Hann verður millum TB og KÍ, hevur Fótbóltssambandið gjørt av.

# 90 føroyingar á hálkubreyt



*Hóast tað hevur verið tosað um hálkubreyt í Føroyum seinastu 30 árini, so er einki hent í málinum. Tað er eitt krav í flestu grannalondum okkara, at fólk skulu á skeið á koyrtekniskari breyt, áðrenn tey fáa koyrikort*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Mánadagin sluppu út við 90 fólk úr Føroyum at royna seg í hálkukoyring á koyritekniskų breytini hjá KTI í Roskilde**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Flestu lond um okkara leiðir krevja í dag koyriroyndir á royndarkoyribreyt ella á hálkukoyribreyt, tá ið koyrikort verður tikið. Men soleiðis er ikki í Føroyum, tí í Føroyum er eingin hálkubreyt.

Hóast tosað hevur verið um hesa hálkubreyt í eini 30 ár, so er púrt einki hent á økinum. Tí var tað, at Fríðrik Bláhamar stjóri á Super Dekk tók stig til hendan túrin, fyri at vísa fakfólki, lokal- og landspolitikarum o. ø., hvussu eitt slíkt skeið kann verða.

Tað var Ferðslutrygd, sum bjóðaði til skeiðið, sum varð hildið á KTI (Køreteknisk Institut) í Roskilde, meðan GoodYear í Danmark hevði leigað breytina til føroyska ferðalagið.

Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd sigur, at um vit ikki hava somu umstøður a slíkum koyritekniskum breytum, sum onnur lond, so er vandi fyri, at koyrikort okkara missir virði.

– Hvørt ár senda fyritøkur og stovnar nógv fólk uttanlands at venja á royndarbreytum fyri at dagføra koyriførleikan. Hetta kundi eins væl verið gjørt í Føroyum, heldur hann.

Meðan ferðalagið var í Roskilde, var eisini høvi at síggja, hvussu Roskilde kommuna hevur skipað ferðslutrygdina í býnum.

Meira verður um hetta evnið í bilasíðunum í blaðnum í morgin.

# Royal smakkaði best



ØLFAGNAÐUR

Fríggjakvøldið var hini fyrsti ølfagnaðurin hildin á Hotel Føroyum. Tað var fullsett til borðhaldið á hotellinum, har ársins skemtari Hilmar Jan Hansen stóð fyri undirhaldinum.

Bryggjaríini og umboð fyri útlendsku ølini søgdu eisini nøkur orð um, hví júst teirra øl var so gott - og so sluppu øll at royna ymsu ølsløgini.

Skipað var eisini fyri einsi sokallaðari blindsmakking, har fýra gløs við frámerki vóru sett á borðið - uttan at fólk vistu, hvat øl var í hvørjum glasi.

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni var:

| | |
|---|---|
| Royal: | 131 |
| Restorffs: | 112 |
| Føroya Bjór: | 94 |
| Carlsberg: | 66 |

**el**

# Lívsins Land aftur á odda

Triðju viku á rað er tað fløgan "Lívsins Land" við Ólavi á Váli, ið er mest selda fløgan á sølulistanum hjá 3'aranum. Á øðrum plássi liggur nýggjasta NOW fløgan "NOW 13". Á triðja og fjórða plássi hava "Førist við Páll Finnur Páll og "Alt" við Kim Hansen býtt um pláss.

Kim hevur støðugt ligið í topp 5, líka síðan fløgan kom út, og er hesa vikuni á fjórða plássi. Hitt føroyska íkastið á listanum eigur Teitur. Alt meðan Teitur fyrireikar seg til upptøkuna av síni aðru fløgu, hevur Poetry & Aeroplanes leitað sær inn aftur á listan, og hevur ligið har nú í nakrar vikur. Ikki færri enn tríggjar savnsfløgur eru á listanum hesa vikuna, umframt Now 13 er talan um "Hits for kids 14" á fimta plássi og "Broken Dreams" á sætta plássi.

**nud**